# Heldur rætta mistøk enn falla í fátt

*Ta› gongur sjálvdan bara eftir ætlan. Heldur ikki á eini fer›avinnusølustevnu uttanlands. Vit eiga tó heldur at rætta ta›, sum er gjørt skeivt, enn at falla í fátt, sigur stjórin á Fer›ará›num*

EDVARD JOENSEN

Ta› hevur veri› ført fram, at fer›avinnumessan Vestnorden Travel Mart er vi› at yvirliva seg sjálva, og at tí›in er komin til, at vit sleppa henni og heldur gera okkara egnu, føroysku fer›avinnumessu.

Hesum sjónarmi›i er stjórin á Fer›ará› Føroya ikki samdur vi›. Hann heldur, at ta› er skeivur vegur at ganga.

-Er okkurt, sum ikki er gingi› eftir ætlan, eiga vit at finna fram til ta›, sum kiksa›i og rætta ta› til eina a›ra fer› heldur enn gevast á hondum, sigur Heri Niclasen, stjóri á Fer›ará› Føroya.

Sagt hevur veri› á fer›avinnustevnuni Vestnorden Travel Mart, sum hildin var› í Reykjavík í seinastu viku, at føroyingar kanska sjálvir áttu at fari› at skipa› fyri egnari fer›avinnumessu.

Um hetta sigur Heri Niclasen, stjóri á Fer›ará› Føroya, at er ta› solei›is, at fer›avinnan í Føroyum metir, at brúk er fyri slíkari messu, er Fer›ará›i sjálvandi til rei›ar vi› rá›um og stu›li, har ta› ber til. Men hann metir ikki, at vit av teirri orsøk skulu sleppa Travel Mart, sum tann sølustevnan vanliga ver›ur nevnd.

Sum skilst á Hera Niclasen, gekk sølustevnan í Reykjavík sum heild væl. Nú er hetta ikki fyrstu fer›, føroyska fer›avinnan er vi› á hesi stevnu, so væl átti at bori› til at skipa seg solei›is, at alt var í lagi, me›an sjálv messan var› hildin.

Tó kendi onkur luttakari ta› solei›is, sum at ikki alt rigga›i, sum ta› skuldi. Onkur avtala tóktist ikki halda, og onkur kundi møtti ikki upp.

Ta› er sjálvandi ke›iligt, tá so er, heldur Heri Niclasen. Men hann vísir tó á, at ta› kunnu vera nógvar grundir til ta›, sum, tá tær ver›a kanna›ar, kanska venda aftur til seljaran sjálvan uttan tó á nakran hátt at lata skilja, at hann heldur júst ta› vera orsøkina.

At taka Travel Mart av er í móti andanum um samstarv, sum júst hendan fer›avinnumessan er bygd á.

Og skuldi ta› hent, at fari› ver›ur undir at fyrireika eina serføroyska messu, eiga vit at hava í huganum, at vit á ongan hátt koma í vegin fyri næstu Travel Mart messuni, sigur Heri Niclasen.

Heri Niclasen sigur, at á Travel Mart í Reykjavík vóru fleiri positiv tekin at síggja frá føroyskari sí›u.



# Eingin flúgving til Billund í vetur

*Maersk Air fer ikki at flúgva millum Vágar og Billund í vetur, sum annars hevur veri› gjørt undanfarin ár*

EDVARD JOENSEN




*Ta› loysir seg ikki hjá Maersk Air at flúgva millum Føroyar og Billund á vetrardegi*

Rutan hjá Maersk Air millum Vágar og Billund í Jyllandi, sum flogin hevur veri› mánadag og fríggjadag, ver›ur ni›urløgd í vetur.

Tann 30. oktober fl‡gur Maersk flogfari› seinasta túrin til Billund á hesum sinni. Flúgvingin ver›ur so ni›urløgd fyri veturin og byrjar aftur í mai komandi ár. Grundin er einfald tann, at ov líti› fólk fer›ast á hesi rutuni

Tó ver›a f‡ra túrar gjørdir um jólini. ver›ur sagt av Flogfelag Føroya, sum umbo›ar Maersk Air í Føroyum. Teir túrarnir ver›a 20. og 22. december og 2. og 3. januar. Hesir túrar eru serliga grunda›ir á útisetar, sum koma heim at halda jól.

Ta› er longu væl umbi›i› til hesar túrarnar, siga tey á Flogfelagnum. Vanliga bi›a fólk um hesar fer›ase›larnar longu beint eftir ólavsøku, ella tá tey fara av landinum aftur eftir summarfrí í Føroyum. Hetta er í stóran mun lesandi, sum koma heim aftur til jóla.

Hesi fer›ase›lar skulu gjaldast í so miki› gó›ari tí›, at til ber at selja ø›rum, um onkur kortini ikki ver›ur brúktur. Onkuntí› hevur ta› veri› so, at fólk vilja tryggja seg og bíleggja til fleiri dagar, tí tey ikki rættiliga vita, nær tey fáa jólafrí. Gloyma tey so at siga frá, standa fer›ase›larnir bundnir óney›uga leingi.

Men fer›amannastovurnar kenna sjálvandi eisini hendan trupulleikan og plaga at »rudda upp«, tá naka› lí›ur út á heysti›.

Annars eru tey á Flogfelag Føroya rímiliga væl nøgd vi› summarflúgvingina í ár. Væl av fólki fer›a›ist, og ta› komst fyri ein part av tilbo›unum, givin vór›u fyrr í summar. Men yvirhøvur hevur væl av fólki fer›ast loftvegis í ár, láta tey at á Flogfelagnum.

Hvussu ver›ur vi› n‡ggjum tilbo›um, vita tey onki at siga um enn. Men ta› kann koma okkurt nær sum helst, skilst. Ta› er Maersk Air, sum skipar fyri tí, og so fær umbo›i› í Føroyum bara bo›, tá ta› hendir.

-Men, ver›ur lagt aftrat av Flogfelag Føroya, vit nærkast lágárstí› nú einafer› aftur.



# Lýsnar herja aftur

*Fleiri skúlar og barnagarðar gremja seg í løtuni um, at fleiri av børnunum ganga við lús. Hetta er ein afturvendandi trupulleiki verður sagt*



*Barnagarðar og skúlar dragast í løtuni við lýs, og tað vísir seg, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki*

STEFAN Í SKORINI

Tað er nærum vorðin gamal vani á hvørjum ári, at skúlar, barnagarðar og onnur støð, har nógv børn savnast, hava trupulleikar við lús.

Tað vísir seg, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki, sum er torførur at fáa bilbugt við. Skúlarnir býta á hvørjum ári út faldarar, sum siga, hvussu sleppast kann av við lýsnar.

### Fleiri hava trupulleikan

Varaleiðarin á barnagarðinum Lítlaskógi, Heidi Justinussen, sigur, at tað er ein stórur trupulleiki, sum tey dragast við í løtuni.

- Trupulleikin er júst blussaður uppaftur, og vit hava drigist við lýs alt árið, sigur Heidi Justinussen.

Á Lítlaskógi hava børn lús við jøvnum millumbilum alt árið, og tað tykist sum trupulleikin bara versnar. Lítliskógur er ikki eindømi, men fleiri onnur hava eisini sama trupulleika.

- Tá vit finna útav, at eitt barn hevur lýs, ringja vit beinanvegin til foreldrini og senda barnið heim, so foreldrini kunnu gera okkurt við trupulleikan, sigur Heidi Justinussen.

Á Lítlaskógi hava tey júst nú funnið lýs hjá onkrum av børnunum. Varaleiðarin kann ikki siga, um tað er eitt serligt slag av lús, talan er um. Tær hava ymiskt skap og eru ymsar á liti, antin brúnar ella svartar.

Tað tykist eisini sum at lýsnar gerast mótstøðuførar, og tí eru tær torførari at sleppa av við.

Á Eysturskúlanum er eitt skelti hongt upp, sum boðar frá lúsatrupulleikanum. Har verður gjørt vart við, at trupulleikin er til staðar, og hvussu berast skal at, um nakar gerst varugur við trupulleikan.

Annars verður sagt av bæði Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki, sum tey dragast við á hvørjum ári.

Har hava tey eisini havt onkran tilburð, síðan børnini komu aftur í skúla, sum lærarar hava gjørt vart við.

Tað vísir seg, at so skjótt sum børnini fara aftur í skúla, eru trupulleikar við lýs.

### Ilt er at basa teimum

Høgni Debes Joensen, landslækni, sigur, at lýsnar gera um seg í bylgjum, og tað hendir við jøvnum millumbilum at lúsatrupulleikar stinga seg upp.

Tað kemur eisini fyri, at tær gerast mótstøðuførar, av tí at fólk brúka ov nógv sjampo. Tí er tað umráðandi, at bara fólk, sum hava fingið ávíst lýs, brúka lúsasjampo. Hetta niðursetir vandan fyri, at tær gerast mótstøðuførar.

Høgni Debes Joensen sigur eisini, at tað er næstan ógjørligt at sleppa undan lýsnum. Tá fólk hava verið og ferðast í øðrum londum kunnu tey koma aftur við lús.

Í Føroyum eru vit sloppin av við kropslýs, sum bara kunnu nørast um persónligi reinleikin er út av lagi ringur. Sambandið millum høvdalýs og persónligan reinleika er hinvegin ikki so stórur. Tað ber til at hava lús, sjálvt um ein vaskar sær ofta.

Um eitt barn hevur fingið lús, so skal restin av húskinum eisini lata seg kanna í eina tíð. Hetta skal gerast, tí tær eru ringar at finna í byrjanini, tá tær eru fáar. Tí skulu øll kannast við jøvnum millumbilum. Hetta verður gjørt við lúsakambi.

Lýsnar og eggini finnast serliga í nakkanum og aftanfyri oyruni, og tað er serliga har hyggjast skal væl eftir.

# Einki er sum aðru ferð

*Rockbólkurin Chase hevur fingið nýggja heimasíðu í sambandi við ætlaninar at geva nýggja fløgu út*

EYÐUN KLAKSTEIN

Nú ber til at jagsta Chase á internetinum.

Rockbólkurin, sum hevði sín stórtíð fyrst í nítiárunum, er heitur fyri at geva eina nýggja fløgu út, og í tí sambandinum hava teir gjørt eina heimasíðu á internetinum, har fjepparar kunnu fylgja gongdini hjá bólkinum.

Millum tað, sum er at finna á heimasíðuni, er eisini ein dagbók, har limirnir í bólkinum av og á ætla sær at skriva í. Edmund Jacobsen, sangari í bólkinum, sum saman við Niclasi Johannesen og Mikkjali Joensen arbeiðir við nýggjum tilfari til Chase, hevur longu skriva í dagbókina.

### Chase var alt

Hann hugleiðir um farnar dagar við góðum og vánaligum konsertum, og hann heldur, at tað er so nógv hent síðani 1989, tá Chase av fyrstan tíð fór at spæla, at tað kann tykjast eitt sindur ræðandi at vekja djórið aftur úr dvala.

- Fyri okkum, sum vóru við í bólkinum, var bólkurin alt. Vit livdu og andaðu fyri hendan forbrenda rockbólkin, sum hevði hug til at yvirtaka og dominera tilveru okkara, skrivar Edmund Jacobsen.

Tey, sum hava hug at lesa meira av hugleiðingunum hjá Edmundi, ella bara eru so forvitin, at tey ikki kunnu lata verða við at síggja síðuna, kunnu tasta www.easy.to/chase á telduknappaborðið.

Konfirmatións-
klæðir til
hansara
fáast í
Kallkyn

Vágsbotnur - tlf. 31 62 06